# Koyrdi undan løgregluni

**Ungur maður í Eysturoynni smildraði tríggjar bilar, tá hann var við í ferðsluóhappi og koyrdi undan løgregluni. Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka**

LÓGBRÓTARI
*Eyðun Klakstein*

Fríggjakvøldið gjørdi ein 21 ára gamal maður í Eysturoynni rættiliga um seg.

Tað byrjaði, tá ungi maðurin kom koyrandi oman gjøgnum Gøtudal. Har var hann óansin og rendi upp í ein bil, sum eisini var á veg oman gjøgnum dalin.

Ungi bilførarin hevði ikki hug at steðga og viðurkenna óhappið, men rýmdi av staðnum.

Løgreglan í Runavík varð boðsend, og hon fór at leita eftir manninum. Teir funnu hann í Gøtu, har hann hevði krógvað seg.

Ungi maðurin royndi at koyra undan løgregluni og setti ferð á yvir ímóti Gøtugjóv. Har rendi hann beint inn í ein bil, sum stóð parkeraður, og tá fekk løgreglan fatur á manninum.

Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka og kann vænta sær stórt endurgjaldskrav fyri ferðsluóhappini.

**Fór út av**

Ein annar bilførari var óheppin í Fuglafirði, tá hann misti tamarhaldið á bilinum í brekkuni við matstovuna, Muntra.

Bilurin fór beina leið oman gjøgnum brekkuna og út av vegnum. Niðanfyri vegin er beding, og bilurin fór teir fýra metrarnar niðurfyri.

Bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka, og hann hevði helst eisini ov nógva ferð, tá hann kom oman gjøgnum brekkuna.

Tveir aðrir bilførarar í Eysturoynni vóru tiknir fyri at koyra við kenning um vikuskiftið. Hesir vórðu tiknir í vanligum eftirliti hjá løgregluni.

# Embætisfólk hjá løgmanni á listanum

**Eitt av nærmastu embætisfólkunum hjá løgmanni var millum móttakararnar av teldubrævinum hjá Hesuferð, sum heitti fólk um at stríðast ímóti samráðingarleiðini hjá løgmanni. Embætiskvinnan heldur, at talan er um eitt mistak**

HESUFERÐ
*Eyðun Klakstein*

Millum móttakararnar av teldubrævinum hjá Hesuferð, sum hevur verið heitt evni seinastu dagarnar, er ein av nærmastu embætisfólkunum hjá løgmanni.

Talan er um Kate Sanderson, sum starvast á uttanlandsdeildini á Løgmansskrivstovuni.

Tá løgmaður fríggjadagin sendi út ávaring ímóti innihaldinum í teldubrævinum hjá Kjartan Hoydal, sendi hann samstundis sjálvt teldubrævið út eisini.

Millum teir stívliga 50 móttakarnar av teldubrævinum var embætiskvinnan á Løgmansskrivstovuni, men hon heldur, at talan er um eitt mistak.

– Kjartan Hoydal hevur jú boðað frá, at brævið var sent út til nógv fleiri fólk, enn hann ætlaði. Tí er tað eisini eitt mistak, at eg havi fingið brævið, sigur Kate Sanderson.

– Eg og Kjartan kennast væl. Vit hava samstarvað nógv – millum annað í sambandi við ymsar ráðstevnur. Tí hevur hann teldupostadressuna hjá mær, og hon er onkursvegna endað á listanum yvir móttakarar av brævinum frá Hesuferð.



*– Eg og Kjartan kennast væl. Vit hava samstarvað nógv – millum annað í sambandi við ymsar ráðstevnur. Tt hevur hann teldupostadressuna hjá mær, og hon er onkursvegna endað á listanum yvir móttakarar av brævinum frá Hesuferð, sigur Kate Sanderson*

**Ikki fyrstu ferð**

Løgmaður kennir seg sannførdan um, at teldubrævið frá Hesuferð var sent júst teimum persónunum, sum tað var ætlað.

Tað heldur hann, at eitt líknandi teldubræv frá átakinum Hesuferð prógvar. Tað teldubrævið var sent av øðrum persóni í Hesuferð í februar mánaði, men móttakararnir vóru so at siga júst teir somu, sum í teldubrævinum frá farnu viku.

– So kann tað teldubrævið eisini verða sent skeivum persónum, heldur Kate Sanderson.

Hon heldur, at ein onnur frágreiðing kann verða, at maður hennara er við í Hesuferð, og at tey onga privata teldupostadressu hava havt.

Løgmaður hevur onga viðmerking til, at starvsfólk í hansara umsiting er millum móttakararnar av nógv umtalaða teldubrævinum, sum hann hevur ávarað ímóti.

## Tveir koyrdu alt ov skjótt

Leygardagin gjørdi løgreglan í Havn ferðamátingar við Hvalvík. Hetta er eitt økið, har er freistandi at koyra skjótt, men tað er sjálvandi ikki loyvt.

Tveir bilførarar trýstu alt ov nógv av spidaran, og teir vórðu tiknir. Annar koyrdi 111 km/t og hin var uppi á 116 kmt/.

Hesir báðir bilførarnir sleppa nú helst upp til eina nýggja koyriroynd, sum teir skulu klára, um teir vilja varðveita koyrikoyrtið hjá sær.

**ek**

## Stórur skaði av eldsbruna

Eini sethús á Lýðarsvegi í Havn fingi stóran skaða, tá eldur kom í tey mánamorgunin.

Eingin fólkaskaði stóðst av eldsbrunanum, sum løgreglan hevur illgruna um byrjaði í eini turkitrumlu í húsunum.

Húsin fingu tó stóra roykskaða, og eisini brendi partur av húsinum.

Sløkkiliðið í Havn fekk tó bilbukt við eldinum eftir einari løtu.

**ek**

# Seismisku kanningarnar steðgaðar

**Útgerðin hjá norskum felag varð somikið skadd, at felagið steðgaði seismisku kanningunum í Leirvíksfirði**

KANNINGAR
*Eyðun Klakstein*

Tað hevur ikki gingið eftir vild við seismisku kanningunum í sambandi við undirsjóvartunnilin um Lorvíksfjørð.

Eitt norskt felag hevði átikið sær hesar kanningarnar, men útgerðin hjá hesum felagnum var so illa skadd av arbeiðnum, at norska felagið steðgaði arbeiðnum.

Tí eru neyðugu seismisku kanningarnar ikki gjørdar enn, men nú arbeiðir Landsverkfrøðingurin við at finna eitt annað felag, sum kann gera kanningarnar í Leirvíksfirði. Landsverkfrøðingur ætlar, at hesar kanningar skulu verða lidnar tíðliga í heyst.

Umframt seismisku kanningarnar eru aðrar kanningar gjørdar av botninum um Lorvíkfjørð. Kjarnuborginar eru gjørdar báðumegin fjørðin, og hesin parturin av kanningum er komin undir land.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Summarfrí**
Stongt er til 27.08.01.
**Kliniskur tannteknikari**
**BERGUR**
**Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík, Tlf. 448480

# ítróttur

Nr. 154 • hósdagur • 14. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hjalgrím í hitan



*Hjalgrím Elttør úr KÍ er spildurnýggjur í landsliðshøpi*

**Hitin kann gerast ein hin størsta hóttanin móti føroyska landsliðnum, sum í gjár kom til Beograd. Hjalgrím Elttør úr KÍ er spildurnýggjur í landsliðshópinum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Gøtumenn royndu tað fyri viku síðani, og nú er tørnið so komið til føroyska landsliðið, sum annars er merkisvert á tann hátt, at eingin leikari úr GÍ er við á liðnum. Royndin, sum tosað verður um, er tað at skula spæla ein fótbóltsdyst í ógvusliga hitanum í Beograd.

Tá gøtumenn her fyri spældu móti FK Obilic, vóru eini 36 hitastig í skugganum, men heilt so nógv verður tað neyvan, tá landsliðið fer at spæla mikudagin. Tann dysturin verður nevnliga leiktur um kvøldið, so hitin man vera minkaður nakað til ta tíð.

**Nýggjur klaksvíkingur**

Sum nevnt, so er landsliðið merkisvert á tann hátt, at eingin leikari úr GÍ er við í 18-mannahópinum, sum nú er staddur í Jugoslavia. Talan hevur annars seinastu tíðina verið um teir báðar, Sámal Joensen og Helga L. Petersen, men báðir eru teir nakað darvaðir av skaðum í løtuni, og hava tí valt at geva avboð til landsliðið. Sámal hevði sum so longu borið seg undan, áðrenn hópurin varð úttikin, meðan avboðið frá Helga hevur viðført, at Jóhannis Joensen úr HB er komin í hópin.

Harafturat hevur talan verið um avboð frá Jón Róa Jacobsen og Pól Thorsteinsson, og í teirra stað eru komnir tveir klaksvíkingar. Heðin á Lakjuni, sum nú spælir í B36, hevur áður verið í landsliðshópinum, men spildurnýggjur í hesum høpi er Hjalgrím Elttor.

Serliga man tað vera úttøkan av Hjalgrími, sum fer fleiri at spíla oyruni, tí enn hevur ungi KÍ leikarin ikki bitið seg 100% fastan á KÍ liðnum. Tað er tó eingin loyna, at við hesum hevur Allan Simonsen klárt givið til kennar, at hetta er ein leikari, sum føroyingar eiga at vænta sær nógv av í framtíðini.

Tað er heldur ikki bara Allan Simonsen, sum hevur lagt evnini til merkis. Longu undan kappingarárinum í fjør peikaði KÍ-venjarin, Tomislav Sivic, á Hjalgrím sum ein leikari, sum stóð fyri sínum stóra gjøgnumbroti, eins og talan eisini hevur verið um venjingaruppihald í Onglandi.

**Hópurin**

Teir 18 leikararnir í hópinum eru sostatt: Kurt Mørkøre og Hjalgrím Elttør úr KÍ, Jóhannis Joensen, og Rógvi Jacobsen úr HB, Hans Fróði Hansen og Fróði Benjaminsen úr B68, Jens Martin Knudsen og Christian Høgni Jacobsen úr NSÍ, John Petersen, Jens Kristian Hansen, Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni úr B36, Julian Johnsson úr Hull City, Johan Byrial Hansen úr OB, Óli Johannesen úr Hvidovre, Øssur Hansen úr B93, Súni Olsen úr FC Zwolle og Jákup Mikkelsen úr Molde. Harumframt eru landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, og hjálparvenjarin Jógvan Martin Olsen, við í ferðalagnum, sum eisini telur Dánjal Andreasen, Torleif Sigurðsson, Birgir Hansen (liðleiðari), Jens Paula Marstein (lækni) og Álv Hansen (fysioterapeutur).

## Pól gevur fyribils avboð



*- Í løtuni er støðan bara tann, at eg ikki hava neyðugu motivatiónina til at spæla á landsliðnum, sigur Pól Thorsteinsson*

**Pól Thorsteinsson sigur seg ikki hava nóg góðan hug at spæla á landsliðnum, og hevur givið avboð fyri restina av árinum**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað mundi koma dátt við, tá ein hin besti verjuleikarin í føroyskum fótbólti, Pól Thorsteinsson, gav avboð til A-landsliðið undan teimum báðum dystunum móti Sveis og Jugoslavia.

Orsøkin var tá, at Pól og FSF ikki vóru samdir um, hvørt leikarin átti rætt til sonevndu bonuspengarnar eftir dystin í Luksemburg, og fyri at mótmæla hesum, gav leikarin avboð.

Talan hevði tó undir øllum umstøðum verðið um avboð, tí beint eftir hetta varð Pól skaddur í dysti fyri B36. Beint fyri summarsteðgin byrjaði hann tó aftur at spæla, og fáur mundi ivast í, at hann aftur fór at gerast partur av landsliðnum, tá ferðin til Jugoslavia stóð á skránni.

Pól var eisini millum teir 18 leikararnar, sum Allan Simonsen tók út til ferðina, men Pól hevur enn eina ferð givið avboð til landsliðið.

Hesa ferð tykist tað tó ikki, sum um tað er nakað trætumál, sum er orsøkin til avboðið.

- Eg havi givið avboð, tí verandi dystarskráin hjá mær er nóg strævin, sum er, sigur Pól við Sosialin.

- Eg havi eisini verið nógv skaddur í ár, og hetta hevur so avgjørt eisini ávirkað støðu mína. Eg havi ongan tíð áður havt nakrar drúgvar skaðar, so ivaleyst havi eg tørv á eitt sindur av hvíld.

Talan er tó á ongan hátt um nakað endaligt avboð frá landsliðsmanninum. Eisini hóast hann ikki sigur seg kenna nakran stórvegis sakn, nú landsliðsfelagarnir fara avstað.

- Í løtuni er støðan bara tann, at eg ikki hava neyðugu motivatiónina til at spæla á landsliðnum, men eg vóni sjálvandi, at hugurin til hetta verður betri komandi ár.

- Tað er sjálvandi harmiligt, men hinvegin havi eg mest sum vant meg við, at eg ikki eri á landsliðnum. Síðani eg varð útvístur í Kekkia fyri tveimum árum síðani, havi eg bara spælt dystin móti Russlandi, so saknurin er ikki so øgiliga stórur. Var eg í slíkari støðu fyri tveimum árum síðani, hevði støðan helst verið ein heilt onnur, sigur Pól Thorsteinsson at enda.